# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Saman við 07 Vestur rennur AB kapp um at fylgja við VB/Sumba í oddinum. Bæði liðini hava um vikuskiftið truplar uppgávur móti eykaliðum hjá Formula-feløgum*

**Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarunum, sum stóðu best í 9. umfarinum av Formula-deildini**




# Hópirnir kunnu styrkjast

**Nú kappingin í fyrstu deild fer um fyrsta triðingin, er TB í álvarsligum vanda fyri at verða krøkt av oddastríðnum. Og tað kann ávirka úrslitini, at landsliðssteðgur er í Formula-deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við fýra stigum upp til 07 Vestur og AB er uppgávan hjá TB á ongan hátt ógjørlig at loysa, men úrslitini seinastu vikurnar hava als ikki givið ábendingar um, at tvøramenn í løtuni hava styrkina at bjóða hinum trimum oddaliðunum av.

Leygardagin er tó aftur ein nýggjur møguleiki hjá TB, tá teir vitja í Klaksvík, men tað kann koma illa við, at landsliðssteðgur er. Tað gevur nevnliga møguleika hjá KÍ at flyta yngstu spælararnar úr Formula-hópinum niður á 1. deild, og tí er ikki óhugsandi, at talan verður um eitt væl mannað lið hjá KÍ.

Tann trupulleikin er eisini serstakliga aktuellur hjá bæði VB/Sumba og 07 Vestur, sum spæla móti ávíkavist EB/Streymi og HB. Hjá báðum pørtum hava teir næst bestu fingið góð úrslit seinastu umførini, og við møguliga styrktum spælarahópum eru tey væl før fyri at gera uppgávuna hjá mótstøðuliðunum heilt trupla. Ein møguleiki, sum eisini er til staðar hjá AB í útidystinum móti B68, tó at toftamenn ikki hava heilt so nógvar spælarar at taka av. Ikki minst tí skaðar eisini hava gjørt um seg hjá liðnum.

Seinasti dysturin í 1. deild er millum NSÍ og Víking, sum bæði hava lið í fremstu deildini.

## Atli gevur avboð

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, sendi hósmorgunin boð eftir miðvallarleikaranum hjá HB, Kára Nielsen, at koma við landsliðnum til Estlands at spæla landsdyst mikukvøldið 4. juni.

Neyðugt var við einum nýggjum manni, tá tað kom avboð frá Atla Danielsen. Atli spælir við Frem í Danmark, og tá Frem skal spæla týdningarmiklan dyst í donsku kappingini, ber ikki til hjá honum at koma við til Estlands.

Kári Nielsen er 27 ára gamal og hevur spælt seks landsdystir fyri Føroyar.

**-mørk**

## FSF á kongress í Sydney

Altjóða fótbóltssamgongan hevur í hesum døgum kongress í Sydney í Australia.

Fyri Føroyar eru trý umboð við á kongressini. Hesi eru Høgni í Stórustovu, forseti, Ísak Mikladal, aðalskrivari og Rúni Heinesen, nevndarlimur í FSF.

Største einstaka málið á kongressini er helst uppskotið hjá FIFA-forsetanum, Sepp Blatter, um at avmarka talið av útlendskum spælarum á ymsu feløgunum. Eitt uppskot, sum ber heitið "six-plus-five", og endamálið er at avmarkað talið av útlendskum spælarum til fimm spælarar fyri hvørt liðið. Eitt tal, sum skal vera galdandi fyri øll fótbóltsfeløg í heiminum.

**-mørk**